# Harmar løgmann at verða nevndur lygnari

**– Tað er ikki skeivt at siga, at vit hava skarvað 10% av útreiðslunum til miðfyrisitingina. Men tað er heldur ikki skeivt at siga, at skerjingin er 3% sigur løgmaður**

MIÐFYRISITINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað harmar meg at eg verðið kallaður lygnari.

Tað er fallið løgmanni rættiliga fyri bróstið, at hann nú verður skuldsettur fyri at siga ósatt og enntá fyri beinleiðis at lúgva.

Nú fíggjarlógin fyri 2004 er samtykt, hevur hann ført fram, at sparingar eru gjørdar í miðfyrisitnigini.

Men tað, sum sum hevur elvt til stríð, er, hvussu stór hendan sparingin er.

Løgmaður hevur nevnt eina sparing uppá 10% og tað hava tinglimir úr andstøðuni kalla beinleiðis lygn.

Men løgmaður vísir staðiliga aftur, at hann hevuir logið.

– Eg havi samanborið fíggjarlógina fyri 2004 við tað fíggjarlógina, sum undanfarna landsstýrið ætlaði at seta i verk.

Løgmaður sigur, at hann greitt segði, at talan var um eina samanbering ímillum endaligu fíggjarlógina fyri 2004 og fíggjarlógina, sum undanfarna landsstýrið ætlaði at seta í verk.

– Eg havi ongantíð sagt, at talan var um eina sparing afturímóti veruligu tølunum fyri 2003.

Hann viðgongur, at tað var ein politisk samanbering, hann gjørdi. Men hon er als ikki skeiv og fíggjarlógin, sum undanfarna samgonga ætlaði at seta í verk, er eitt alment skjal, sigur løgmaður.

Hann leggur afturat, at hann hevur einans hildið seg til eina útreiðslugreining, sum løgmansskrivstovan og Fíggjarmálaráðið, hava gjørt.

– Tað skerst ikki burtur, at undanfarna samgonga ætlaði at brúka 114,303 milliónir til miðfyrisitingina. Tað skerst heldur ikki burtur, at nú endaliga fíggjarlógin fyri 2004 er samtykt, endaði tað við, at 102,863 milliónir eru settar av til miðfyrisitingina.

– Sostatt er talan um eina sparing upp á 10% afturímóti tí, sum undanfarna landsstýrið ætlaði.

Hinvegin er tað eisini rætt, at verður fíggjarlógin í ár samanborin við roknskapin fyri 2003, er talan um eina sparing upp á 3%.

– Samanumtikið er støðan tann, at hvørt einasta ár, síðani 1998, er miðfyrisitingin dýrkað. Men nú er útreiðsluvøksturin steðgaður og talan er enntá um eina beinleiðis sparing. Og tað haldi eg, er eitt sera gott tekin at senda almenninginum, leggur hann afturat.

**Útreiðslur viðvíkjandi miðfyrisitingini 1998-2004**

Útvaldar høvuðskontur undir málsøki 11, 12 og 32

| Høvuðskonto | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 FLU-1 | 2004 FLU-2 | 2004 FLU-3 | 2004 FL |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11101 Sjálvstýrisfyrisitingin (Rakstrar.) | | 5.442 | 4.279 | 4.613 | 4.239 | | | | | |
| 11102 Løgmansskrivstovan (Rakstrar.) | 17.729 | 13.756 | 12.270 | 13.079 | 13.941 | 11.670 | 12.238 | 12.500 | 12.000 | 12.000 |
| 11103 Fíggjarmálaráðið (Rakstrar.) | 6.451 | 7.620 | 7.227 | 7.573 | 6.641 | 7.392 | 7.722 | 7.842 | 7.342 | 7.342 |
| 11105 Fiskimálaráðið (Rakstrar.) | 6.124 | 7.673 | 10.639 | 11.640 | 13.298 | 15.578 | 19.037 | 17.315 | 16.315 | 16.815 |
| 11106 Vinnumálaráðið (Rakstrar.) | 4.668 | 5.707 | 6.524 | 6.909 | 8.364 | 8.342 | 9.700 | 9.500 | 9.000 | 9.000 |
| 11108 Almanna- og heilsumálaráðið (Rakstrar.) | 4.238 | 16.380 | 18.018 | 19.502 | 21.263 | 21.934 | 27.341 | 21.411 | 20.411 | 20.911 |
| 11109 Mentamálaráðið (Rakstrar.) | 11.593 | 13.043 | 13.866 | 14.771 | 15.668 | 16.138 | 13.915 | 15.131 | 14.381 | 14.621 |
| 11128 Løgmálaráðið (Rakstrar.) | | | | | | 9.628 | 8.797 | | | |
| 11131 Oljumálaráðið (Rakstrar.) | | | | 7.311 | 7.979 | 9.471 | 9.821 | | | |
| 32101 Oljufyrisitingin (Rakstrar.) | 6.330 | 9.999 | 10.486 | | | | | 6.654 | 5.654 | 6.154 |
| 11139 Innlendismálaráðið (Rakstrar.) | | | | | | | | 11.260 | 9.260 | 9.760 |
| 12301 Løgmaður og landsstýri (Rakstrar.) | 4.936 | 4.446 | 4.696 | 4.996 | 5.647 | 5.601 | 5.750 | 6.250 | 6.250 | 6.250 |
| Í alt | 82.061 | 84.068 | 88.105 | 90.391 | 96.840 | 105.753 | 114.303 | 107.863 | 100.613 | 102.863 |
| Árligur vøkstur í % | | 26% | 5% | 3% | 7% | 9% | 7% | 2% | -5% | -3% |
| Vísital 1998=100 | 100 | 135 | 142 | 148 | 156 | 170 | 184 | 174 | 162 | 166 |

*Hendan talvan frá løgmansskrivstovuni og Fíggjarmálaráðnum vísa gongdina í útreiðslunum til miðfyrisitingina tey seinastu árini. Har tað stendur FLU 1 er talan um fíggjarlógina, sum undanfarna landsstýrið ætlaði at seta í verk. FLU 2 er uppskotið, sum hetta landsstýri legði fyri tingið. FLU 3 er fíggjarlógin, sum hon sá út, tá ið hon kom úr fíggjarnevndini og FL er fíggjarlógin, soleiðis sum hon varð samtykt*

### Óheppið

Løgmaður sigur, at hesar seinastu dagarnar er tað ført fram, at útreiðslurnar til Almanna- og Heilsumálaráðið, eru yvirmettar í fíggjarlógaruppskotinum hjá undanfarna landsstýri.

– Tað vísir seg, at útvið fimm milliónir krónur til elektroniska sjúklingaskrá, eru settar upp sum útreiðslur hjá ráðnum og tað áttu tær ikki at verðið.

Politikarar úr andstøðuna hava ført fram, at hetta hevur við sær, at ikki ber til at samanbera útreiðslur til miðfyrisiting í fíggjarlógaruppskotinum hjá undanfarnu samgongu við tær í fíggjarlógini fyri 2004.

– Tað er óheppið, at útreiðslur, sum ikki hava við fyrisiting at gera, eru settar upp sum útreiðslur hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum, sigur løgmaður.

Hann sigur, at hesar fimm milliónirnar til elektroniska sjúklingaskrá átti helst at verið sett upp undir øðrum málsøki, har hon hoyrdi heima.

Men løgmaður vísur eisini á, at hóast sitandi landsstýri hevur færri limir enn undanfarna, eru lønarútreiðslurnar til landsstýrisfólk í ár væl hægri enn í fjør.

– Orsøkin til hetta er, at ein part av 2004 verða lønir eisini goldnar landsstýrisfólkum, sum eru farin úr starvi. Men komandi ár kann roknast við, at hendan útreiðslan lækkar, sigur Jóannes Eidesgaard

Hann vísur eisini á, at eingin greið allýsing finst av hugtakinum »miðfyrisiting« og at gongdin viðvíkjandi miðfyrisitingini kann lýsast á ymsan hátt.

– Lýsingin hjá Løgmansskrivstovuni og Fíggjarmálaráðnum av nevndu høvuðskontum er ein av fleiri møguligum, men alt hetta hevur við sær, at lýstu tølini eiga at tulkast við varsemi.

– Sostatt er støðan tann, at verða tølini á fíggjarlógini fyri 2004 samanborin við fíggjarlógaruppskotið fyri 2004 hjá undanfarnu samgongu – uttan tillagingar í samband við elektroniska sjúklingaskrá ella annað – er úrslitið ein minking upp á 10 prosent.

– Myndin broytist nakað, um vit tillaga uppskotið hjá undanfarnu samgongu og taka burtur útreiðslur til elektroniska sjúklingaskrá. Verður hetta gjørt, eru útreiðslurnar á fíggjarlógini fyri 2004 á leið 6 prosent minni enn tað, sum undanfarna samgongu ætlaði at brúka til miðfyrisiting, sigur løgmaður.

# Tríggir formenn á vitjan

**Formenninir fyri økisráðini í Hetlandi, Orknoyum og Suðuroyggjum fara úr aftur Føroyum hósdagin**

Sunnudagin komu politisku leiðararnir fyri trý oyggjasamfelag í Norðuratlantshavi til Føroya at vitja.

Talan er um formenninar fyri økisráðini í Hetlandi, í Orknoyggjum og Í Hetlandi, sum eru komnir til Føroya, her teir steðga til hósdagin.

Tað er Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sum er vertur fyri vitjanina.

Hetta er fyrsta vitjan av sínum slagi, har politisku leiðararnir fyri Føroyar og oyggjabólkarnar fyri sunnan, møtast.

Umframt fund við løgmann, har millum annað evni so sum fiskivinna, alivinna, oljuvinna og mentan verða viðgjørd, fara ráðsformenninir at kunna seg um føroyska samferðslukervið, sjúkrahúsverkið og annað.

Mánamorgunin vóru teir eisini eisini ein túr úti í Tinganes, har Gunnar Hoydal er frásøgumaður og teir vitja eisini Løgtingið, har Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna formanskapin greiðir frá.

Ì Føroyum vitja teir eisini Listaskálan og teir fara eisini at hoyra stjóran í Føroya Tele, Andrass Róin greiða frá um telesamskifti okkara og stjórin á Strandferðsluni, Kristian Davidsen fer at greia frá strandferðslu og teimum nýggju skipunum, hjá Strandferðsluni. Eisini stjórin í Atlantsflogi, Magni Arge fer at greiða teimum frá flogferðsluviðuraskiftum. Útlendsku gestirnir vitja eisini oljufyrisitingina og Norðurlandahúsið, har Karin Kjølbro, stýrislimur, greiðir frá.Somuleiðis fer Poul Geert Hansen, stjóri fyri Landssjúkrahúsið at greiða frá nýggja bygninginum og Dávid Reinert Hansen, stjóri fyri Vágatunnilin fer at greiða teimum frá um undirsjóvartunlarnar. Teir fara eisini til Kirkjubøar og at enda sleppa teir eisini at síggja flaggskip okkara, Norrønu.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður fegnast um, at okkara næstu grannar fyri sunnan eru komnir á vitjan.

– Søguliga hava verið sterk bond millum Føroyar, Hetland, Orknoyggjar og Suðuroyggjar, og vit hava nógv felags áhugamál. Vónandi kann hendan vitjanin verða byrjanin til eitt nýtt tíðarskeið við øktum politiskum og vinnuligum samstarvi millum oyggjabólkarnar, sigur løgmaður.



*Politisku leiðararnir úr oyggjalondunum fyri sunnan, avmyndaðir í trappuni í Tinganesi. Næst løgmanni stendur Sandy Cluness úr Hetlandi, í miðjuni, Alex Macdonald úr Suðuroyggjum og høgrumegin, Stephen Hagan úr Orknoyum*



# Kostnaðarmetingin heldur

**Um ein mánað ella so verður nýggi bygningurin hjá Føroya Tele liðugur, og Andras Róin, stjóri á Føroya Tele, sigur, at tað sær út til, at kostnaðarmetinging fer at halda**

BYGGING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Arbeiðið upp á nýggja bygningin hjá Føroya Tele í Hoyvík er komin so mikið væl áleiðis, at bygningurin allarhelst verður handaður fyrst í komandi mánaða. Upprunaliga tíðarætlanin segði annars, at bygningurin ikki bleiv liðugur fyrr enn einaferð í heyst.

### Serlig bonusskipan

Kostnaðarmetingin av nýggja høvuðssætinum hjá Føroya Tele er 93 milliónir krónur, og stjórin á Føroya Tele, Andras Róin, sigur, at tað sær út til, at metingin fer at halda. Hann sigur, at nú er arbeiðið komið so mikið væl áleiðis, at tað er avmarkað, hvussu nógv kann ganga galið.

Í avtaluni millum byggiharran, Føroya Tele, arkitektarnar og entreprenørin MT Højgaard, er eisini ein serlig bonusskipan gjørd. Hendan bonusskipan merkir, at verður samlaði kostnaðurin av byggingini niðan fyri 93 milliónir, fara partarnir at merkja ágóðan av hesum. Siga vit til dømis, at kostnaðurin verður 90 milliónir, so verða tær tríggjar milliónirnar, sum eru upp til tær mettu 93 milliónirnar, býttar millum arkitektarnar, entreprenørin og Føroya Tele eftir einum ávísum býtislykli. Tó sigur Andras Róin, at tað í mesta lagi verða fimm milliónir, sum verða at býta, tí markið er sett við einum kostnaði upp á 88 milliónir. Tað vil siga, at verður kostnaðurin til dømis 86 milliióinir, so verða tað tó framvegis ikki meiri enn fimm milliónir at býta.

### Ikki tikið støðu viðvíkjandi gamla bygninginum

Viðvíkjandi gamla bygninginum hjá Føroya Tele, sum stendur beint niðan fyri nýggja bygningin, sigur Andras Róin, at enn er ikki avgjørt, hvat fer at henda við honum. – Í fyrstu atløgu verður hann standandi, og okkurt av virkseminum hjá Føroya Tele fer at halda fram har, men tað er væl hugsandi, at hann einaferð í framtíðini verður tikin niður og fluttur, sigur stjórin á Føroya Tele. Andras Róin sigur, at leiðslan á Føroya Tele metir, at í nýggja bygninginum er rúm fyri øllum virkseminum hjá stovninum, og tí er ikki tørvur á gamla bygninginum.

Hóast nýggi bygningurin verður liðugur fyrst í komandi mánaða, so verður hann neyvan tikin í nýtslu fyrr enn fyrst í august mánaða, sigur Andras Róin, tí at Føroya Tele skal nýta okkurt um ein mánað upp á gera tær neyðugu innstalatiónirnar við telefonskipanum og líknandi, umframt at alt annað innbúgv skal setast upp, sigur stjóri á Føroya Tele, ið er sera væl nøgdur við byggingina og gleðir seg til at flyta inn í nýggja høvuðsætið.




*Um ein mánað verður nýggja høvuðssætið hjá Føroya Tele liðugt. Enn er tó ógreitt, hvat fer at henda við gamla bygninginum beint niðan fyri nýggja høvuðssætið*

*Mynd: Savnsmynd*

# SEV lænir 20 mió. krónur komandi ár

**Stóru íløgurnar í ár og komandi ár er høvuðsorsøkin til, at SEV hevur valt at fíggja part av íløgunum við lántøku. Niðurgjaldingin av skuld heldur kortini á**

FÍGGJARÆTLAN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Umboðsnevndarráðið hjá SEV samtykti fríggjadagin fíggjarætlanina fyri 2004 og 2005 hjá SEV-stýrinum. Formaðurin í SEV, Klæmint Weihe sigur seg ikki vænta nakran vøkstur í ár, tí versnandi búskaparstøðan og hóttafall hjá fleiri vinnum ávirka nógv fíggjarstøðuna hjá stovninum.

SEV hevur stórar íløgujáttanir komandi árini. Í ár eru 67,3 mio. krónur settar av til íløgur. Dýru íløgurnar hava við sær, at umboðsnevndarráðið samtykti eina lántøku á 20 mió. krónur komandi ár.

– SEV fíggjar vanliga íløgurnar yvir raksurin, men komandi ár hava vit valt at taka lán fyri at varðveita gjaldførið á stovninum. Vit rinda 35 mio í skuld árliga, og hóast vit taka eitt lán á 20 mió. krónur, so rinda vit netto 15 mio. krónur komandi ár, greiðir Klæmint Weihe frá. Við árslok 2003 skyldaði SEV 226 mio. krónur. Á SEV vænta tey, at skuldin við árslok 2004 verður um góðar 200 mio. krónur

### Neshagi og Eiði 2

Stóru íløgurnar hjá SEV í ár fevna um tær tríggjar vindmyllurnar á Neshaga í Eysturoynni, býtisvirkini kring landið, og ein stóran 60 kilowatt kaðal úr Sundsvirkinum inn á Skálafjørðin.

Komandi ár skal sjøtil setast á Eiði -2 vatnorkuætlanina, og har eru 25 mio. krónur játtaðar. Samlaða íløgujáttanin hjá SEV komandi ár er 78,8 mio. krónur.

# Hættislig støða í Suðuroy

**Klæmint Weihe sigur, at SEV merkir týðuliga eina lækking í el-nýtsluni fyrsta ársfjórðing í ár, sammett við í fjør. Serliga apríl mánaði hilnaðist illa.**

EL-NÝTSLAN MINKAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tølini fyri el-nýtsluna hjá SEV fyrsta ársfjórðing í ár eru alt enn bjørt. Hóttafallið í bæði alivinnuni og flakavinnuni seta síni spor í hagtølini hjá SEV. Í Suðuroy er støðan rættiliga álvarsom

– Á meginøkinum er tað serliga alivinnan sum ávirkar, meðan hóttafallið í flakavinnuni ikki merkist eins væl. Í Suðuroy er støðan øðrvísi, tí har er kreppan í flakavinnuni sjónlig. Vit hava í ár havt eina minking á góð 12 % í el-nýtsluna, so gongdin er lítið hugalið, greiðir Klæmint Weihe frá.

Klæmint Weihe greiðir frá, at serliga apríl mánaði hilnaðist illa í fyrsta ársfjórðingi. Sammett við apríl mánaða í fjør er el-nýtslan lækka við sløkum 2%. SEV hevði eisini niðurgongd í januar mánaði, meðan februar og mars royndist nakað beturi.